# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Símun Waag Høgnesen, Klaksvík:

## Koyrilærari í 40 ár

Tann 5. august 2005 vóru 40 ár liðin síðan Símun Waag Høgnesen í Klaksvík tók prógv sum koyrilærari í 1965.

Símun hevði framman-undan, sum so mangir aðrir, virkað sum koyrilærari uttan prógv, men nú settu myndugleikarnir krav um prógv, til teir sum ynsktu at halda fram.

Hann var tann fyrsti, sum fekk prógv til bæði persónbil og motorsúkklu, og virkar hann framvegis sum koyrilærari, tó serliga til motorsúkklu. Til koyrilærararoyndina hjá Símuni sat Jógvan Sundstein við rattið sum næmingur.

Tveir synir hjá Símuni eru í dag koyrilærarar, Manni og Ólavur.




*Skúlavognur hjá Símuni Waag Høgnesen, Ford Taunus 12 m frá 1966*




*5. august 2005 vóru 40 ár liðin síðan Símun Waag Høgnesen í Klaksvík tók prógv sum koyrilærari*

Havnar leksikon:

## Óli Arge fyrstur við rutukoyring við bussi



*Myndaeigari: Føroya Fornminnissavn*

Í 1944 byrjaði Óli Arge (Buss Óli) við eini bussleið í Havn. Fýra tey fyrstu árini koyrdi hann við einum lastbili, sum teir báðir Victor Carlsen og George Eklund bygdu um til buss. Í 1948 fær Óli ein annan Bedford buss úr Onglandi við sitiplássum til 32 ferðandi.

Nevnast kann, at Óli Arge var tann fyrsti, sum byrjaði rutukoyring við bussi í Havn.

Á myndini eru gamla telefonstøðin og løgtingshúsið, ið nú eru samanbygd.

Oyggin á vegnum, ið her ikki er heilt liðug, varð gjørd, eftir at lok varð lagt á Havnará í 1957, og bleivn hon tikin burtur aftur í 1969. Eitt tíðarskeið stóð jólatræið, sum annars hevur staðið á Tingúsvøllinum síðan 1934, á hesi oynni.

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesar myndirnar, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647 ella 214647.



*Óli Arge (1897-1965)*